## Smuglari hálshøgdur

Myndugleikarnir í Saudiarabia hava hálshøgt ein indiskan ríkisborgara, sum varð funnin sekur í at hava smuglað rúsevni. Samstundis vórðu tólv ungir dreingir dømdir pískasløg fyri at hava gjørt seg upp fyri nøkrum kvinnum í einari viðarlund.

Tann indiski maðurin varð dømdur fyri at hava smuglað eina ókenda nøgd av heroini, og fyri tað varð hann hálshøgdur, skrivar almenna saudiarabiska tíðindastovan.

Higartil hava saudiarabisku myndugleikarnir avrættað minst 27 fólk, sum eru dømd eftir teimum teimum strongu muslimsku sharia-lógunum. Í fjør vórðu 75 fólk avrættað í Saudiarabia, í 2000 var talið 121.

## 13 ára gamal drápsmaður

Tríggir ungir dreingir, sum eru 18, 15 og 13 ára gamlir, komu leygardagin sjálvbodnir á eina løgreglustøð í Stockholm, eftir at løgreglan hevði sóknast eftir teimum í fleiri dagar í sambandi við eitt morð.

Sambært blaðnum Dagens Nyheter hava eygnavitni greitt løgregluni frá, at teir tríggir beindu fyri einum 19 ára gamlum manni í Stockholm, og sagt verður, at tað var tann 13 ára gamli drongurin, sum stakk tann 19 ára gamla so meint, at hann doyði.

Fáar dagar frammanundan varð ein 27 ára gamal maður skotin í sama býarpartinum í Stockholm. Í tí málinum hevur løgreglan tikið tveir 22 ára gamlar menn, sum eru skuldsettir fyri morðið.

## Flogfar rendi á kvinnu

Ein 42 ára gomul kvinna í Brasil doyði um vikuskiftið, tá eitt flogfar rendi á hana.

Myndugleikarnir siga, at kvinnan var farin út at renna á einari lendingarbreyt, sum ikki verður nýtt longur. Men hendan dagin setti eitt lítið Cessna-flogfar seg á breytina. Tað vildi so illa til, at annar vongurin á flogfarinum rakti kvinnuna, sum doyði beinanvegin.

Myndugleikarnir siga, at flogskiparin rýmdi av staðnum, men tað eydnaðist løgregluni at taka hann seinni. Hann er nú skuldsettur fyri ótilætlað mannadráp.

## Leyp niður til krokodillur

Ein thailendsk kvinna doyði sunnudagin, tá hon brádliga leyp niður í ein hyl við krokodillum.

Kvinnan var saman við fleiri øðrum fólkum á einari framsýningarferð í einum krokodillugarði, tá hon brádliga leyp niður í hylin. Ferðaleiðarin hevur greitt løgregluni frá, at alt hendi so skjótt, at hjálparfólkini fingu einki gjørt.

Thailendska løgreglan kunngjørdi seinni, at talan var um eitt ætlað sjálvmorð. Tað vísti seg, at kvinnan hevði skrivað eitt skilnaðarbræv, har hon skrivaði, at hon hevði gjørt av at taka lívið av sær.

# Ísraelsk niðursetufólk taka hús hjá palestinum

**Samstundis sum ísraelskir og palestinskir myndugleikar tykjast nærkast hvør øðrum, eru ísraelsk niðursetufólk farin at taka hús hjá palestinum, sum eru flýddir, ella sum ísraelski herurin hevur flutt burtur**

MIÐEYSTUR
*Árni Joensen:*



*Samstundis sum ísraelsku og palestinsku myndugleikarnir nærkast hvør øðrum, halda ísraelsmenn fram við at jagstra limir í yvirgangsfelagsskapinum Hamas. Her fer ein Hamasleiðari til gravar í Gaza sunnudagin*

Tað er serliga á leiðini við Hebron, at víðgongd ísraelsk niðursetufólk hava brotið seg inn í hús hjá palestinum, sum eru flýddir undan bardøgum, ella sum ísraelski herurin hevur flutt burtur haðani.

Ísraelska blaðið Haaretz skrivaði í gjár, at framferðin hjá niðursetufólkunum stríðir ímóti ísraelskari lóggávu og boðunum, sum herleiðslan hevur givið. Blaðið visti eisini at siga, at ísraelska trygdartænastan hevur skrivað eina frágreiðing um málið, har hon bað Ariel Sharon, forsætisráðharra skipa so fyri, at lóg og landaskil aftur fæst at virka í og við Hebron.

– Ísraelsk niðursetufólk hava tikið fleiri palestinsk hús. Tey búgva ikki har alla tíðina, men koma og fara. Aðrastaðni hava tey brotið inn og oyðilagt innbúgv og annað. Niðursetufólkini hava eisini brotið inn í fleiri palestinskar handlar, sum ísraelsku hermenninir hava stongt. Tá hermenninir biðja tey fara burtur haðani, sýta tey fyri at gera eftir boðunum, sigur Nanna Ahlmark, sum er talskvinna hjá altjóða eygleiðaraliðnum í Hebron.

Hetta samsvarar væl við tað, sum ein embætismaður í ísraelsku trygdartænastuni sigur við Haaretz.

– Tað eru serliga ung jødisk pør, sum taka húsini, sjálvt um tey einki hava at gera har, sigur embætismaðurin við blaðið.

Sunnudagin lupu víðgongdir ísraelskir niðursetumenn á palestinar í einari bygd longur norðuri á Vestara Áarbakka, har nógvir palestinar vórðu riknir úr húsum sínum. Sagt verður, at fleiri av niðursetufólkunum høvdu vápn.

Ágangurin frá teimum ísraelsku niðursetufólkunum hevur vundið upp á seg, júst sum viðurskiftini millum ísraelsku og palestinsku myndugleikarnar tykjast batna. Ein palestinsk sendinevnd var í USA um vikuskiftið, har hon hitti m. a. Colin Powell, uttanríkisráðharra og George Tenet, CIA-stjóra. Aftaná segði Yasser Arafat í Ramallah, at fundirnir høvdu verið sera gagnligir.

# Eiturskýggj hóttir milliónir í Suðurasia

**Eitt tríggjar kilometrar høgt eiturskýggj hóttir lívið hjá fleiri milliónum í syðra parti av Asia, men tað kann fáa avleiðingar aðrastaðni eisini**

UMHVØRVI
*Árni Joensen:*

Sambært einari frágreiðing, sum umhvørvisdeildin hjá ST almannakunngjørdi í gjár, er skýggið ein eitrað samanrenning av øsku, ymsum sýrum, aerosolum og ymsum øðrum. Sagt verður, at skýggið kann gera skaða á grøðina og kann somuleiðis broyta tey vanligu regn- og vindviðurskiftini í økinum frá Afghanistan til Sri Lanka.

Í frágreiðingini stendur, at skýggið heldur sólarljósinum burturi og kann elva til bæði turk og vatnflóð, sum kunnu hótta fleiri milliónir mannalív.

Stjórin í umhvørvisdeildini hjá ST, Klaus Tøpfer, sigur, at tey hava longu staðfest ávísar broytingar, sum standast av eiturskýnum, men at tað er neyðugt at gera fleiri kanningar, áðrenn tað ber til at siga við vissu, hvussu stórar avleiðingarnar verða.

Um upprunan til eiturskýggið sigur stjórin, at tað er eitt úrslit av skógareldum, einum skjótt veksandi útláti av dálkandi royki frá bilum og verksmiðjum og nógvum húsarhaldstólum, sum framvegis nýta við og onnur biologisk evni til brenni.

Sambært ST-frágreiðingini verður sólarljósið skert umleið 15 prosent, tá tað rakar skýggið, og tað er munandi meiri, enn serfrøðingar høvdu væntað. Úrslitið er, at jørðin kølnar, meðan tey niðaru luftløgini í atmosferuni orna, tí hitin verður savnaður í skýnum.

– Av hesum fáa vit munandi minni regn í útnyrðingspartinum av Asia og munandi meiri regn fram við asiatisku eysturstrondini, sigur Klaus Tøpfer. Mett verður, at avfallið í útnyrðingspartinum av India, Pakistan, Afghanistan, vestara parti av Kina og Miðasia fer at minka millum 20 og 40 prosent.

Stjórin í umhvørvisdeildini hjá ST heldur, at frágreiðingin um eiturskýggið eigur at vera ein álvarssom ávaring til altjóða umhvørvisfundin, sum verður í Johannesburg í næsta mánað.

– Tað er ikki nóg mikið við orðum longur. Nú má okkurt gerast til tess at tryggja framtíð Jarðarinnar, sigur Klaus Tøpfer.

ítróttur

Nr. 152 • týsdagur • 13. august 2002 • 76. árgangur • www.sosialurin.fo

# Spenningur um nýggja landsliðið

**Føroyingar fara nú undir eina nýggja 4-4-2 spæliskipan, og landsliðsvenjarin verður tí noyddur at fremja broytingar á liðnum til dystirnar í heyst**

LANDSLIÐIÐ
*Páll Holm Johannesen*




*Komandi vikurnar verður møguligt at síggja hvørjar leikarar, Henrik Larsen, ætlar at nýta á landsliðnum. Hansara fyrsta uppgáva verður næsta mikudag ímóti Liktinstein á Tórsvølli.*
*Mynd: Savnsmynd*

Seinasta hósdag varð so kunngjørt hvørjir leikarar nýggi landsliðsvenjarin, Henrik Larsen, ætlar at nýta í sínari 4-4-2 spæliskipan. Fyrsti dysturin hjá nýggja landsliðsvenjarinum verður á Tórsvølli næsta mikudag ímóti Liktinstein.

Hópurin til dystin ímóti telur 18 mans, har Arnbjørn Danielsen úr B36 og Johannis Joensen úr HB skulu vera tøkir, um onkur spælari skuldi verið skaddur. Umframt Arnbjørn og Johannis, so skulu Atli Danielsen og Ove Nysted eisini vera við á venjingarleguni, sum verður komandi vikuskifti á Svangaskarði.

Líka síðan føroyska landsliðið á fyrsta sinni fór í altjóða kapping, hevur landsliðið spælt við einum aftasta manni, men nýggi landsliðsvenjarin hevur boðað frá, at nú er ætlanin at royna spæliskipanina 4-4-2. Hetta hevur so við sær, at Føroyar í framtíðini fara at spæla við einari flatari verju. Hyggja vit eftir hvørjir verjuleikarar hava fingið boð til dystin ímóti Liktinstein, so eru tað Óli Johannesen, Hans Fróði Hansen, Pól Thorsteinsson, Jón Rói Jacobsen. Umframt hesar fýra, so kann Súni Olsen úr GÍ eisini spæla í verjuni.

### Vinstri bakkur ivamál

Hvussu Henrik Larsen ætlar at skipa verjuna, er ilt at spáa um, áðrenn føroyska liðið hevur spælt nakran dyst, men vit fara at hætta okkum at vísa hvørjar møguleikar hann hevur.

Vágin við at spæla við flatari verju er hon, at tað er næstan eitt krav, at miðverjarnir eru skjótir og tekniskt væl fyri. Jón Rói, Óli, Hans Fróði og Pól kunnu allir røkja plássini í miðverjuni, men spurningurin er bara hvussu nýggi landsliðsvenjarin velur at blanda kortini.

Ein verja við Óli Johannesen og Hans Fróða í miðverjuni, uttan nakran aftasta mann, hevði skjótt kunnað verið runnin av, og tí kann henda samansetingin tykjast heldur ivasom. So er meira sannlíkt at annar av miðverjunum verður Pól Thorsteinsson ella Jón Rói Jacobsen, sum kunnu spæla saman við antin Óla ella Hans Fróða. Bæði Jón Rói og Pól eru skjótir verjuleikarar, og hava teir báðir staðið seg væl í landskappingini á ár.

Í hópinum, sum er úttikin ímóti Liktinstein, eru tvey boð um høgra bakk plássið. Um Óli Johannesen ikki verður ein av miðverjunum, so er hann upplagt evni til høgra bakk. Hann spældi í sínari tíð í AGF nógv á hesum plássinum. Pól Thorsteinsson hevur bæði verið miðverji og høgri bakkur hjá NSÍ í ár, og hann hevði eisini uttan nakran trupulleika kunnað røkt plássi.

Verri stendur til við vinstra bakki, tí har er einki upplagt evni ímillum teir átjan. Til dystin ímóti Liktinstein eru fýra vinstrabeintir spælarar, men teirra pláss liggur longri frammi á vøllinum. Millum Andrew av Fløtum, Rógva Jacobsen, Heðin av Lakjuni og Súna Olsen, er Súni Olsen mest upplagda evnið til vinstra bakk. Súni spælur annars vanliga longri frammi á vøllinum hjá GÍ, men til dystin ímóti Liktinstein, kann tað væl vera, at hann verður at finna á vinsta bakki.

Havast skal eisini í huga, at í løtuni er liðskiparin á føroyska landsliðnum, Jens Kristian Hansen, úti við skaða, og um hann verður við aftur, so er hann avgjørt eisini upplagt evni til vinstra bakkin. Enn er ógreitt, um liðskiparin ætlar sær halda áfram við landsliðsfótbólti. Liðfelagin hjá Jens Kristian í B36, Arnbjørn Danielsen, er eisini evni til vinstra bakk plássið.

Aðrir leikarar, sum kundu komið uppá tal eru HB-mennirnir Janus Joensen og Hans á Lag, ið báðir hava spælt á plássinum hjá havnarliðnum í ár. Janus Joensen við á venjingarlegu hjá landsliðnum fyrr í ár, men fekk álvarsama skaða.

Janus hevur tvey tey seinastu árini verið ein av støðugastu leikararnum hjá HB, men eftir skaðasteðgin, hevur Janus havt ilt við at bíta seg fastan aftur á HB-liðið. Hans á Lag hevur leingi verið nevndur sum evni til landsliðið, men enn hevur hann ikki fingið landsliðsboð.

Hans hevur stóran part av árinum spælt á vinstra bakki hjá HB, og røkt uppgávuna væl, hóast hann er meira vanur við at vera miðverji.

### Nógvir møguleikar á miðvøllinum

Miðvøllurin á føroyska landsliðnum er væl-mannaður, og nógvir eru um boðið til tey fýra plássini. Sum nakað nýtt fer landsliðið at spæla við tveimum vongspælarum, og ikki sum áður við tveimum vongbakkum

B36-leikarin, Jákup á Borg, tykist verða best upplagda evni til ein høgra vong. Jákup beit seg rættiliga fastan á høgra vongverja á landsliðinum í síðstu HM-undankapping, og hansara styrkir eru avgjørt frammeftir vøllinum, og tí má tað kennast væl fyri hansara viðkomandi, at spæliskipanin er løgd um.

Eins og fyri Jákup á Borg, so kemur Heðin av Lakjuni betur til sín rætt við nýggju spæliskipanini, tí báðir leikarar eru meira vongspælarar enn vongverjar. Heðin hevur higartil havt torført við at fáa spælitíð á landsliðnum, tí fleiri spælarar hava verið um boðið á vinstra vongverja, sum kanska vóru betur enn Heðin til verjuskyldurnar. Við 4-4-2 skipanini verður spennandi um klaksvíkingurin verður meira eyðsýndur á landsliðnum.

Alternativini til Heðin og Jákup sum vongspælarar eru, Hjalgrím Elttør,ið rættiliga hevur gjørt ein vørr í landskappingini í ár, og Rógvi Jacobsen, sum eisini røkja uppgávuna í vinstra borðið. John Petersen er eisini upplagt evni, tí um venjarin ikki ætlar at nýta John mitt á miðvøllinum, so er eisini møguleiki at nýta hann úti í onkrum borði.

Boðini til bæði plássini mitt á miðjuni eru mong, Julian Johnsson, Fróði Benjaminsen, John Petersen, Rógvi Jacobsen og Sámal Joensen eru allir spælarar, sum kunnu røkja uppgávuna. Julian Johnsson og Fróði Benjaminsen tykist tó at vera mest upplagdu evnini í løtuni. Báðir hava verið fastir fúsir leingi á landsliðnum, og báðir eru bóltvinnara-typur, sum føroyska landsliðið altíð hevur brúk fyri. Hvar Henrik Larsen so ætlar at seta John Petersen er ilt at siga, men skálamaðurin kann bæði spæla í álopinum ella úti í einum borði.

### Christian Høgni annar framherjin

Nú gamla álopsparið á landsliðnum við Toda Jónsson og Una Arge er farið í søguna, verður spennandi at síggja hvussu álopið í framtíðini kemur at síggja út.

Christian Høgni Jacobsen verður allarhelst annar framherjin, men so er spurningurin hvør verður við hansara lið. Til dystin ímóti Liktinstein, eru Andrew av Fløtum, Helgi L. Petersen, John Petersen og Jón Rói møgulig evnir til ein sess í álopinum.

Andrew av Fløtum hevur havt eitt gott kappingarár, og er toppskjútti í føroysku landskappingini, so hann fær møguliga møguleikan ímóti Liktinstein frá fyrsta bríksli. Helgi L. Petersen hevur ikki verið at sæð so nógv sum framherji, eftir skiftið úr Gøtu til Runavíkar, so tað er ivasamt, um hann verður undir liðini á Christian Høgna.

John Petersen hevur avgjørt verið ein av bestu leikararnum á landsliðnum seinastu árini, men tað hevur einamest verið á miðvøllinum og ikki í álopinum. John Petersen er áleypari hjá B36, og verður hann ikki á miðvøllinum hjá landsliðnum, so verður hann uttan iva í álopinum. Sunnudagin vísti John sínar dygdir sum áleypari, tá einsamallur rak HB-verjuna av sær.

Ein annar møguleiki er ungi og sera evnaríki Jón Rói Jacobsen, sum aftur í ár, hóast sín unga aldur, er ein av høvuðsstuðulunum á HB-liðnum. Jón Rói kann bæði spæla í álopinum og afturi í verjuni, men á landsliðnum hevur hann fyri tað mesta verið brúktur í álopinum. Spurningurin er so, um Henrik Larsen velur at nýta Jón Róa í verjuni ella í álopinum.

Hvussu verður og ikki, so verður spennandi at síggja nýggja landsliðið í dysti næsta mikudag ímóti Liktinstein á Tórsvølli.